

Vitja okkara havaframsýning við nógvum góðum hugskotum

á Bústevnuni

Summarið nærkast...

í ORKIS

• Inn/úthurðar • Garaguhurðar • Takplátur • Ídnaðargólv •

Fleiri ymisk typuhús • Vindeygu

Vatntetting av betong








Býli

656 Saltnes • Tlf. 218850 / 218223








Hús & Innbúgv

Vælkomin á okkara bás á Bústevnuni






Vit hava vitjan av Mikael Viderø, arkitekti (vinstrumegin á myndini), ið vegleiðir um húsasnið, innrætting, val av tilfari, litir o.s.fr. Mikael verður at hitta leygardagin og sunnudagin kl. 14.30 - 20.00. Kundaráðgevar bankans verða at hitta á básinum, so leingi stevnan varir.

Harumframt verður møguleiki at vinna gávukort frá IDÉ Møblum á kr. 5.000.

FØROYA BANKI

# Hógv eigur heitasta básin á bústevnuni

**Teir vælumtóktu føroysku lágorkuketlarnir frá Hógv verða at síggja við inngongdina á tjaldinum, sum er partur av stevnuøkinum.**
**- Vit síggjast á heitasta básinum, eru slagorðini hjá felagnum**

KETLAR
*Vilmund Jacobsen*

Tað er ikki av tilvild, at partafelagið, Hógv Handilsvirki í Søldarfirði, hevur bás í tjaldinum, sum verður sett upp við síðuna av ítróttarhøllini í Runavík. Í tjaldinum, sum er leigað úr Danmark, er eingin hiti, men hesum fer Hógv at syrgja fyri. Felagið, sum framleiðir teir vælumtóktu føroysku lágorkuketlarnar, fer nevniliga at seta upp eina hitaskipan í tjaldinum. Á henda hátt fara tey, sum vitja inn á básin, at síggja ketil og oljufýring í "drift".

## Sera góð tilboð

Á bústevnuni, Hús og Innbúgv, fer Hógv at vísa fram brosjurur við ketlum og fjarhitaeindum.

- Stevnudagarnar fara vit at geva sera góð tilboð til teirra, sum ætla sær at keypa ketil.

Ketilin, sum felagið kallar L-2000, er bæði kendur og sera væl umtóktur.

- Vit fara eisini at vísa fram nýggjasta ketilin, C-30 og C-100, sum eru ávikavist 30 og 100 kw, sigur felagið.

## Dygd og orkusparing

Føroysku lágorkuketlarnir, sum Hógv framleiðir, eru bæði dygdargóðir og orkusparandi.

- Vit síggjast á tí heitasta básinum, eru slagorðini hjá Hógv á bústevnuni, Hús og Innbúgv.

Hógv Handilsvirki hevur tlf. 441963, gsm 211963 og fax nr. 442025.

E-postadressan hjá felagnum er:
hogv@post.olivant.fo




*Føroysku lágorkuketlarnir, sum Hógv framleiðir í Søldarfirði, eru bæði dygdargóðir og orkusparandi.*
*- Vit fara at geva sera góð tilboð á bústevnuni, sigur felagið*